# Vilhelm Nielsen farin

**Vilhelm Nielsen, fyrrverandi løgtingsmaður úr Sandavági, andaðist mikumorgunin. Hann var 90 ára gamal**

Eina viku eftir, at fasta sambandið um Vestmannasund varð veruleiki, andaðist ein av fedrunum at hesum sambandi, Vilhelm Nielsen, fyrrverandi løgtingsmaður í Sandavági. Hann er farin um breiðari sund og er nú hjá fedrunum, sum skrivað stendur.

Vilhelm Nielsen var 90 ára gamal, nú hann andaðist. Hann fylti 90 ár tann 28. august, og fekk sama dag tað upplivilsið at sleppa at koyra gjøgnum tunnilin undir Vestmannasundi.

Hetta var nakað, sum veruliga frøddi gamla stríðsmannin, sum í sjeytiárunum saman við Haldori Hansen, fyrrverandi løgtingsmanni, birti lív í kjakið um fast smaband um Vestmannasund. Tá varð uppskot teirra mestsum hildin fyri gjøldur. Men tað gingu ikki 25 ár til ein onnur og betri ætlan gjørdist veruleiki.



*Vilhelm saman við soninum Paula og abbasoninum Vilhelmi tá hann í august fylti 90 ár og fekk ein túr ígjøgnum Vágatunnilin í føðingardagsgávu*

Ein bygdarmynd í Sandavági er farin. Vilhelm og Marianna, sum høvdu diamantbrúdleyp í apríl í fjør, hava spakað seinasta túrin eftir vegnum út eftir Sondum. Tað er nakað síðan, Vilhelm gavst at koyra í lítla lastbilinum, sum var vanlig sjón áv vegunum í Vágum.

Vilhelm og Marianna áttu fýra børn. Paula, Sofus, Sólgerð og Onnu.

Umframt at Vilhelm Nielsen var kendur sum løgtingsmaður, man at kalla hvørt mansbarn í Føroyum, ið er komið nakað til árs, kenna navnið Vilma, sum var skinnvirkið, tey bæði, Vilhelm og Marianna høvdu í mong ár.

Vilhelm Nielsen var útbúgvin skósmiður. Eisini var hann á yngri árum, sum føroyingar flestir, sjómaður, og hevði seinni ábyrgdina av fiskturkingini hjá bróðurinum, Zachariasi Nielsen í Sandavági. Seinni fór Vilhelm at handla, og var hann tann fyrsti í Vágum, sum fór at selja eitt nú el-lutir so sum útvarpstól og ljósakrúnur.

Vilhelm Nielsen var í mong ár deknur í Sandavágs Kirkju.

**ej**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum komu inn á gólvið, og tykkum, sum á annan hátt mintust til mín á 75 ára føðingardegnum.

Bestu heilsanir við ynski um eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

**Daniel Jacob Nielsen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri hjálpsemi og sýnda samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma og systir okkara

**Anna Dalsgaard**

lá sjúk, andaðist og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á B6 fyri tykkara stóru umsorgan og røkt.

*Familjunnar vegna*

**Jákup Dalsgaard**

## Tøkk

Eina hjartans tøkk til øll tykkum, ið fløvaðu hjørtu okkara og hjálptu til á ymiskan hátt, tá okkara kæri pápi, abbi og verfaðir

**Jógvan Jallur Højgaard**

andaðist og varð jarðaður.
Eingin nevndur eingin gloymdur.

Gleðilig jól og eitt signað nýggjár

*Fyri tey avvarðandi*

**Húngunn**

# Enn eitt gyklaskeið

GYKLASKEIÐ



Leygardagin tann 28. desember verður aftur møguleiki at koma á eitt sokallað gyklaskeið. Gykl er føroyskt fyri tað danska „tryllekunst", og er tað júst hetta sum verður á skránni. Tey luttakandi á skeiðinum verða undirvíst í nøkrum kynstrum, ið síðani kunnu brúkast at vísa fyri øðrum.

Meiningin við skeiðinum er at geva luttakarunum innlit í hesa "listagreinina", og umframt at tey læra nøkur kynstur, fáa tey eisini møguleikan at upptraðka fyri hvørjum øðrum á skeiðnum.

Hetta er næsta royndin at gera eitt slíkt skeið. Fyrsta skeiðið var hildið á Strondum fyri einum mánaða síðani, og var hetta eitt sera væleydnað skeið. Teir 16 luttkararnir vóru sera væl nøgdir bæði við undirvísingina og fyri møguleikan at upptraðka fyri hvørjum øðrum og familju og vinum.

Enn er ikki avgjørt hvar hetta næsta skeiðið verður hildið, men tað verður í hvussu so er eitt stað á meginøkinum. Skeiðið er fyri ungdómar í 6. flokki og eldri. Vaksin eru eisini vælkomin!!!

Einasta krav, ið sett verður, er at tey, ið tekna seg, eru áhugað í at læra gyklakynstur á einum rímiligum støði.

Luttøkugjaldið er 250,-, og tað ber til at tekna seg á email:
stuttligt@hotmail.com

Avmarkað luttakaratal!

Tey sum tekna seg fáa nærri at vita gjøgnum mail.



STAÐ: Skansabryggjan

STØÐD: 1.500 m²

VØRUGOYMSLA: 1.200 m²

PLATTAPLÁSS: 1.270 m²




**Eimskip letur upp vøruhotel**

***Vit flyta inn í okkara nýggja skrivstovu- og pakkhúsbygning 19. desember, 2002.***

Talan er um ein framkomnan bygning við øllum teimum nýggjastu hentleikum innan goymsluøkið.
Stórur dentur er lagdur á góðsku, soleiðis at Eimskip kann bjóða sínum viðskiftafólki eina nýmótans vøruhandfaring á altjóða stigi.
Bingjurnar verða framyvir fyltar og tømdar inni í vørugoymsluni.
Á henda hátt kann Eimskip tryggja bestu viðferð av vøruni.

Tørvar tær goymslupláss, kanst tú nú goyma vøru í vøruhotellinum hjá Eimskip. Tú kanst leiga teg inn í pakkhúsbygningin og brúka hann til goymslu. Umframt vøruhotel og vanliga vørugoymslu, bjóðar Eimskip eisini frígoymslu í nýggja pakkhúsinum. Vøra kann goymast ótollað í frígoymsluni, til hon verður tikin út eftir tørvi.
***Vælkomin inn í okkara nýggja vøruhotel.***

Tað ræður um tænastu og aftur tænastu

EIMSKIP